## Fekk sekkin fyri at stuðla Týsklandi

Stadionspeakarin Andreas Wenzel, ið starvast á Olympia Stadion í Berlin hevur mist atgongdina til mikrofonina fyri restina av HM. Orsøkin er, at hann undir dystinum millum Týskland og Argentina skundaði undir áskoðararnar fyri at fáa teir at stuðla týska liðnum. Tað er ikki fallið í góða jørð hjá FIFA.

– Tað er ímóti røttum ítróttaranda og kann ikki góðtakast. Speakarin verður skiftur beinanvegin, sigur ein talsmaður fyri FIFA.

Wenzel hevur verið speakari á Olympia Stadion í 13 ár, men hann sleppur nú ikki at verða frásøgumaður til HM-finaluna, ið hann annars hevði glett seg sera nógv til.

## Venjing í AaB byrjað aftur



Hósdagin í farnu viku fóru spælararnir hjá AaB undir venjingina aftur. Danska superligan byrjar 19. juli, og eftir eina stutta summarferiu, eru spælararnir hjá AaB nú farnir undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið. Heimasíðan hjá AaB skrivar, at spælararnir vóru í góðum lag, tá teir møttu til fyrstu venjingina. Súni Olsen er smáskaddur, men hann vandi við. Jón Rói Jacobsen hevur knæskaða, og hann var bara við, tá ið spælararnir høvdu styrkisvenjing eftir vanligu venjingina.

## Málini í Gundadali

**1-0: Bergur Midjord, 17.**
Sylla fær bæði tíð og pláss í høgru síðu, og tá hann sendir ein góðan bólt innfyri, stútar Bergur hart í meskarnar uttan møguleika hjá HB-málverjanum.

**2-0: Amed Sylla Davy, 71.**
Kári Nielsen fer púrasta skeivur av bóltinumn uppi á miðjum vølli. Tað gevur Sylla møguleikan at strúka avstað. Og tá hvørki Kári sjálvur ella Rasmus Nolsøe megna at renna ivorianaran av, sendir hann flatt fram við Tróndi Vatnhamar í B36-málinum.

**3-0: Johan Ellingsgaard, 78.**
HB verður fangað høgt uppi á vøllinum, og so gongur skjótt. Sylla sendir Johan avstað við góðari sending, og tó at Tróndur fær hondina á, so megnar hann ikki at forða fyri málinum.

**4-0: Bergur Midjord, 84.**
Alex Dos Santos og Símun Hansen spæla skjótt smáspæl, og so verður Bergur sendir avstað í vinstru. Eingin tykist hava hug at fara ímóti honum, og so er Bergur kaldur og følir bóltin út um Trónd og inn um handara stólpa.

**5-0: Bergur Midjord, 86.**
Uppspælið er í høgru, men við frálíkum skifti sendir Hanus Thorleifsson bóltin yvir til ein púra leysan Berg, sum við einum hørðum vinstrabeinsskoti sendir bóltin fram við málverjanum.

**6-0: Hanus Thorleifsson, 90.**
Nú tykist bara alt rigga hjá B36. Hóast Símun mest sum hevur mist bóltin, so fær hann kortini roynt seg við drønskoti, sum smellur í tvørtræið. Hanus er skjótari enn HB at fylgja upp, og so er eyðmýkingin fullkomin.

### Alt rapaði

Eftir steðgin tóktist HB hava sett sær púra greitt, hvat skuldi gerast. Fyrsta korterið var tað rár hending, at bólturin var nær HB-brotsteiginum, men opnu møguleikarnir trutu kortini. Tað nærmasta HB kom eini útjavning var eitt fríspark á brotsteigarmarkinum, men hetta sendi Rasmus Nolsøe tó langt omanfyri.

Tá B36 – eftir groft HB-mistak – skoraði til 2-0, vóru bara 19 minuttir eftir at spæla. Tað í sjálvum sær undirstrikar helst eisini, hvussu stórt fallið hjá HB var seinastu løtuna av dystinum.

Orsøkirnar til hetta kunnu helst vera nógvar. Millum annað at tað er avmarkað, hvussu nógvar royndir spælararnir á liðnum hava, og at tað tá kann koma fyri, at okkurt rættiligt skrædl rakar.

Men tað skerst ikki burtur, at bonkurin hjá HB eisini má taka sær sín part av ábyrgdini. Eftir 2-0 máStutt var ímillum 2- og 3-0 málini hjá B36, og tá hesi vóru komin, vóru møguleikarnir at vinna seg aftur onkra staðni millum avarska lítlir og púrt eingir.

Men kortini valdi venjarin at satsa alt. Sum kundi tað verið í lagi at fremja tvær offensivar útskiftingar, men rokadurnar, sum vórðu gjørdar í sambandi við hesar vóru milt sagt hasarderaðar. Við at taka Jovan – var kanska smáskaddur – og Kára Nielsen av miðvøllinum, misti HB teir spælarar, sum høvdu verið við til at mynda dystin. Og við at stilla seg í eina tunna 3-3-4 uppstilling góvu teir B36 púra frítt at spæla kontraspælið, sum liðið í nógvar mátar meistrar so sera væl.

Og á B36-beinkinum var Sigfríður Clementsen heldur ikki leingi um at taka av. Sigfríður Clementsen hevði longu koyrt kvika Johan Ellingsgaard inn fyri Obi, og løtu seinni varð troytti Sylla skiftur um við Símun Hansen. Saman við spruttandi væl upplagda Bergi Midjord hevði B36 soleiðis ein álopspart, sum var bæði ómøddur og kvikur. Og við eini trímannaverju, sum tilsamans hevur spælt bara 83 dystir á besta HB-liðnum, var vandin fyri skrædli ovurstórur.

### Opið sár í sjálvsálitið

Eingin ivi er um, at úrslitið í sjálvum sær sendi ein skelk ígjøgnum sjálvsfatanina á HB-liðnum. Í so máta er næsti dysturin hjá liðnum av ovurstórum týdningi. Og at stórvask verður á skránni á Eiðinum í Vági er lítil ivi um í so máta.

Mest grundleggjandi er uttan iva, at sjálvsálitið hjá spælarunum aftur fæst í rættlag. Í løtum hevur HB í ár spælt sum eitt komandi meistaralið, og tað ræður fyrst og fremst um at leita ta spæligleðini og trúnna upp á egin evni framaftur. Og so er at smíða skjótt viðbrekna sjálvsálitið aftur, soleiðis at ein slíkur off-dagur ikki fullkomuliga koppar heilum kappingarári.

Hjá B36 er støðan hinvegin júst tann øvugta. Liðið hevur nú í tveimum dystum skotið 10 mál, og uttan iva halda spælararnir í løtuni, at teir kunnu ganga á vatninum, um hetta verður kravt. Tí er fremsti setningurin hjá venjarunum helst at fáa bæði beinini væl og virðiliga niður aftur á jørðina. Komandi dysturin móti NSÍ stendur á skránni longu í miðvikuni, og tá er umráðandi, at góða arbeiðið, sum er gjørt seinastu vikurnar, ikki dettur aftur til jarðar.

# Ræðuligt



Mynd: Álvur

Tróndur Vatnhamar spældi til og við 2004 við B36. Í fjør gjørdi hann av at skifta til grannarnar í HB, og tá Bárður Johannesen reyk út við skaða, hevur hann fingið møguleikan at verja reyð/svarta málið.

Sunnudagin mundi hann tó hava hug at ynskja seg alla aðrastaðni, og sjálvur viðgekk hann eisini, at hetta ikki var nøkur serliga stuttlig uppliving.

– Hetta er nokk tað ringasta, sum eg nakran tíð havi upplivað. Talan var kanska um ein kollektivan off-day hjá okkum, men teir vinna eisini nógv á taktiska borðinum, tá vit satsa alt seinastu løtuna. Vit taptu móti einum betri liðið, sum var betri skipað. Men eg haldi, at skuldi B36 vinna á HB, so skuldu vit sova, og vit snorksova í dag, helt Tróndur eftir dystin.

Hinvegin, so helt hann ikki, at dyggi smeiturin fer at forkoma øllum vónum hjá HB um at gera seg galdandi.

– Hetta er fyrsta ordiliga nøsin, sum HB hevur fingið í ár, men á sín hátt var hon kanska væntandi. Útskiftingin í hópinum hevur verið stór, og tí eru tað í stóran mun óroyndir spælarar, sum nú eru á liðnum. Og tað kann kosta, tá mótgongd av slíkum slag meldar seg.

– Nú er tað so upp til okkum at prógva, at vit eru betri enn hetta. Og tað mugu og skulu vit gera longu komandi umfar, helt Tróndur.

**-mørk**

# Fantastiskt



Mynd: Álvur

Var lagið ringt í HB-leguni, so var tað ikki óvæntað púrasta øvugt í syðra endanum av Gundadali.

Dagsins maður var sjálvandi Bergur Midjord, sum stóð fyri trimum av B36-málunum, og hann duldi ikki fyri, at hetta var ein ótrúlig uppliving.

– Eg satsaði sjálvur upp á at fáa eitt mál. Tað fekk eg so í fyrra hálvleiki, og at talan so bleiv um tvey afturat eftir steðgin var bara heilt fantastiskt.

Tað tóktist, sum blivu tit bara betri og betri seinastu løtuna, meðan alt gekk galið hjá HB. Hvussu kendist tað hjá tykkum á vøllinum?

– Eg haldi, at vit fingu gott pláss. Teir satsa alt frameftir, og so gjørdist tað púrasta opið. Og tað klára vit tíbetur at revsa.

Seinastu árini hava tit havt sera trupult við at skora mál. Nú hava tit fingið tíggju í tveimum dystum – hvat er hent hjá tykkum.

– Tað virkar, sum er tað veruliga gloppið hjá okkum. Nú byrja tingini knappliga at rigga, og tað er ein deilig kensla. So er bara at vóna, at kósin nú er sett móti gullinum, staðfesti Bergur Midjord.

**-mørk**